# Apple hevur metúrslit



Eftir almannakunngerðingina av besta roknskaparúrsliti nakrantíð, eru greinarar ikki longur í iva: Apple við Steve Jobs, stovnara og høvuðseigara á odda, fer at gerast heimsins størsta felag, mált í marknaðarvirði.

Metgóðir roknskapir fyri trimum vikum síðani avdúkaðu eina sølu upp á 16 milliónir krónur. iPhones og eina tvífalding í søluni av iPads Tað fær greinarar at vænta hækkandi partabrævakursir hjá Apple komandi 12 mánaðirnar.

Um hesar framskrivingar koma at halda, fer Apple at hevja seg upp um allar heimsins fyritøkur í marknaðarvirðr, skrivar CNBC.

*kelda: bussiness-line.fo*




*Hetta er dømi um, hvussu Vikuskiftistorgið sdaUm doluptatie tie do delit lor irilisl sdfsfq*

*Mynd: sfsfsdfsdfn*

# Alt um vikuskiftið á einum stað

## LÝSINGARÁTAK Sosialurin fer í næstu viku undir nýtt lýsingarátak, har kunnað verður um alt, sum hendir um vikuskiftið

**Eirikur Lindenskov**

Mikudagin fer Sosialurin undir nýggjan tátt, sum vit kalla Vikuskiftistorgið.

Hetta er eitt serligt tilboð til lýsarar, ið vilja hava sín boðskap út um tað, sum fer fram um vikuskiftið.

Ætlanin við hesum teigi er, at eitt nú matstovur, dansistøð, hýruvognar, samkomur, biografar, fyrilestrahaldarar, bingolýsingar - og so sjálvandi tey, ið hava okkurt at bjóða um vikuskiftið - bæði á bygd og í bý.

Endamálið er at savna upplýsingar um alt, sum fyrifertst um vikuskiftið á einum stað, har lesarin kann fáa fult yvirlit yvir tað, sum hendir.

---

*Ov fáar lógir koma í tingið í dag, sum hava uppruna í politiskum ideologium. Meginparturin hevur sín uppruna í krakkaveldinum, sum brúkar Løgtingið sum ekspeditiónskontór. Úrslitið er ein toppstýrd skipan sum byggir á misálit og kontroll heldur enn álit og málstýring*

Thomas Arabo

# Bót fyri at klandrast um dóttrina

Tað hevur nú kostað trimun fólkum bót, at tey ikki dugdu at tosa fólkaliga saman um eitt lítið barn, men ístaðin fóru at skeldast.

Talan var um eitt par, sum var farið frá hvørjum øðrum. Dótturin var hjá pápanum, men skuldi heim til mammuna um kvøldið.

Tá ið mamman og maðurin, hon nú var forlovað við, kemur eftir dóttrini og hon stolt vísir mammuni, at hon hevur fingið hol í oyruni og oyralokkar, fór alt yvir gevind, tí mamman bleiv í øðini, tí hon vildi ikki, at hon skuldi fáa hol í oyruni og tað visti pápin.

Orð ókst av orðið og tað endaði við at mamman kravdi at fáa nøkur klæði hjá dóttrini, sum lógu inni hjá pápanum.

Pápin noktaðu mammunin og nýggja manninum at fara inn í húsið, men tey trokaðu seg inn, har skeldaríið helt fram. Tað endaði við, at pápin fór eftir byrsu. Men hann segði, at hon var ikki løðd og tað mótmælti ongin. Pápin sigur, at hann hevði bara byrsuna, men hini bæði siga, at hann hótti við at skjóta.

Tað endaði við, at pápin 10 fimm dagbøtur upp á 200 krónur fyri at loypt alvorligan ótta á mamuna og nýggja mann hennara, men tey bæði fingu so afturfyri fimm dagbøtur í part upp á 200 krónur fyri at hava trokað seg inn á pápan.

# Fleiri doyggja av rúsvenismisnýtslu

Í 2009 doyðu yvir 50 fólk undir 30 ár í Danmark orsakað av rúsevnismisnýtslu 276 rúsevnismisnýtarar í Danmark doyðu í 2009 av misnýtslu og tí harða lívinum, sum misnýtslan elvir til. Hetta eru 38 fleiri enn í 2008 og 17 fleiri enn i miðal tey seinastu 10 árini.

52 af misnýtarunum náddu ikki at fylla 29 ár, og tríggir vóru millum 14 og 18 ár. Teir flestu misnýtararnir doyggja í Keypmannahavn, har talið veksur skjótt. Tað eru mest menn, sum doyggja av rúsevnismisnýtslu. Í 2009 doyðu 217 menn og 59 kvinnur av misnýtslu.




*Lítil og fittur er hann, indiski bilurin, sum skuldi vera heimsins bíligasti, men eingin vil hava hann…*

# Eingin vil hava heimsins bíligasta bil

## BILAR Bilurin, sum eitur Tato Nano, og er framleiddur í India, skuldi vera heimsins bíligasti bilur

**Áki Bertholdsen**

Fyri góðum tveimum árum síðani varð nógv gjørt, tá ið eitt bilavirki í India kom á marknaðinum við Tata Nano, sum skuldi vera heimsins bíligasti bilur.

Upprunaliga kostaði hann einar 14.000 krónur, men síðani er prísurin uppfarin og nú táttar hann í 20.000 krónur.

Men hóast hann fekk meiru umrøðu tá ið hann kom fram, enn nýggja modellið hjá Rolls Royce, sum kom samstundis, og hóast 20.000 ikki er nógv fyri ein bil, hevur Tata Nano verið ein sjáldsom sjón á indisku vegunum, skrivar danska blaðið Motormagasinet.

Sagt verður, at tað eru serliga tvær orsøkir til, at so fá vilja hava bilin. Onnur orsøkin er, at prísurin hækkaði úr 14.000 krónum heilt upp í 20.000 krónur.

Hin orsøkin er, at stúrt verður fyri trygdini av tí at bilurin er so lítil og skirvisligur.

Annars var ætlanin eisini at gera eitt serliga fínt modell av Tata Nano til marknaðin í Evropa, men tað er lagt á hyllina, í hvussu so er fyribils.